Føroya longsti sper›il

Leygardagin stungu tvøramenn ein sper›il, sum er meiri enn tvær fer›ir so langur sum tann, i› skopuningar reypa›u av í Dimmalætting herfyri

FØROYSKT MET
Áki Bertholdsen

Tvøramenn eru n‡ggir føroyameistarar í at stinga sper›il.

Hetta var sta›fest leygardagin.

Sostatt tók ikki langa tí› at sláa sper›lameti›, sum skopuningar kanna›u sær í Dimmalætting herfyri.

Føroyameistarasper›ilin hjá skopuningum ar 2,34 metrar. So vítt vit minnast, viga›i hann gott tvey kilo og var gó›ar 22 sentimetrar í tvørmát.

2, 94 metrar

Men hetta føroyska meti› er nú væl og vir›iliga sligi›.

Leygardagin flettu Álvur Enni og Róland Sørensen eina 14 ára gamla ær hjá Rólandi. Og sper›ilin teir stungu var ikki minni enn 4,95 metrar langur.

Hann viga›i 3,4 kilo og har hann var tjúkkastur, var hann 21,4 sentimetrar í ummáli.

Sostatt er hann meiri enn tvær fer›ir so langur sum skopunarsper›ilin.

Teir bá›ir siga, at teir kundu havt stungi› hann longri, men teir vildu hava eitt sindur at leypa uppá til eitt anna› ár, um onkur annar skuldi klára› ein uppaftur longri sper›il…

Teir siga, at ta› var longu á jóansøku at hugskoti› var› fostra› at stinga Føroya longsta sper›il.

– Me›an vit sótu og práta›u, helt Álvur Enni einafer› fyri, at ta› hev›i veri› stuttligt at vita, hvussu langan ta› hev›i bori› til at fáa ein sper›il, sigur Róland Sørensen.

Hann sigur, at hann var klárur beinanvegin.

– Eg hev›i eina 14 ára gamla ær, sum skuldi drepast, so ta› var eisini beinanvegin, at ærin var› ávíst, sum skuldi leggja sper›ilin til royndina.

Tá i› teir lósu um skopunarsper›ilin í Dimmalætting, blivu teir ikki nervøsir, tí teir siga, at ta› er ikki óvanligt í Trongisvági at stinga sperlar, sum eru tveir metrar og gott ta›.

Annars var›sper›ilin stungin vi› øllum tí, sum su›uroyingar plaga at stinga sper›lar vi›. Fyrst var› ein lungnabiti koyrdur ígjøgnum. Róland sigur, at lungnabitin glí›ur óføra væl ígjøgnum og hann líkasum dregur tálgina vi› sær, so at hann ver›ur lættari at stinga. Sí›ani hava teir skori› kjøt av ymsum krovum at stinga hann vi›, eitt nú hálsar o.a.

Róland Sørensen sigur, at hetta var ein hampiliga gó› ær, sum teir flettu. Ærin sjálv viga›i 41 pund. Men hon átti eisini tvey lomb, eitt gimburlamb, sum viga›i 25 pund og eitt ve›urlamb sum viga›i 35 pund.

Her standa teir bá›ir methavararnir vi› Føroya longsta n‡rasper›li samanringa›um á einum bakka. Vinstrumegin er ta› Álvur Enni og høgrumegin, Róland Sørensen, sum átti ærina, sum sper›ilin er av. Útstrektur máldi sper›ilin 4,95 metrar, men hann kundi ver›i› longri, siga teir bá›ir

Landi› tekur pensjónina inn aftur í gjøgnum skattin

Tekur landsst‡risma›urin undir vi›, at pensjónistar sleppa undan at gjalda MVG av sjónvarpsgjaldinum, útvarpsgjaldinum, olju og el-orku, spyr He›in Mortensen fíggjarmálará›harran

POLITISKUR FYRISPURNINGUR
Ólavur í Beiti

Hvussu nógv rinda føroyskir pensjónistar í MVG av sjónvarpsgjaldinum, útvarpsgjaldinum, olju og elorku? Kann landsst‡risma›urin vátta, at ta› er umsitingarliga einfalt at gera hesar ney›ugu útrei›slur hjá pensjónistum MVG-fríar? Og He›in Mortensen vil so eisini hava at vita frá Karsten Hansen, um hann tekur undir vi›, at pensjonistar sleppa undan at gjalda MVG.

Í vi›merkingunum til fyrispurningin sta›festir He›in Mortensen, at føroyskir pensjónistar hava ikki ov nógv at liva av. Tann sera avmarka›a pensjón, teir fáa frá landinum, røkkur ikki langt.

– Ta› er at »føje spot til skade«, at landi› samstundis tekur pensjónina innaftur í gjøgnum skattin. Fyri pensjónistin er ta› ta› sama, um skatturin eitur inntøkuskattur, ella hann eitur meirvi›isgjald, ella okkurt heilt tri›ja.

– Fyri tey eldru í dag eru inntøkurnar sera smáar. Hóast ta›, vilja okkara pensjónistar fegnir gjalda fyri seg, gjalda útvarp, sjónvarp, olju og el. Men tá MVG ver›ur lagt á hesi gjøld – tá gerst húsarhaldi› ov tungt, sigur He›in Mortensen.

Sum vi› busskortinum

Og sambandstingma›urin vil hava fíggjarmálará›harran at grei›a tinginum og Føroya fólki frá, hvussu nógv vanligir pensjónistar lata landinum í MVG fyri útvarp, sjónvarp, olju og el. Bæ›i hvussu nógv stakir pensjónistar og giftir pensjónistar lata, bæ›i fólk í egnum húsum og leiguíbú›um.

– MVG'i› tykist lætt at taka av á hesum vørum og tænastum. Talan er bara um at leggja eina kodu inn í telduskipanina, so vøran til tann pensjónera›a kundan ver›ur skrásett sum »ikki MVG skyldug«. Til ber at n‡ta sama framfer›arhátt, sum tá talan er um busskort. Eitt einfalt prógv fyri, at vi›komandi er pensjónistur, so ver›ur ein annar prísur kravdur av sær sjálvum.

Vi› einum metstórum yvirskoti í landskassanum eiga vit at lata ein skattalætta, sum merkist hjá teimum, sum mest tørva. At lætta um hjá teimum eldru á henda hátt er ikki meir enn sømiligt, sigur He›in Mortensen.

Ov líti› samband millum næmingatímar og játtan

Føroya Handverksmeistarafelag hev›i nevndarfund fríggjadagin, har felagi› vi›gjørdi stø›una vi›víkjandi teknisku skúlunum í Føroyum, skrivar Vinnuhúsi›

Máli› er á›ur umrødd á heimasí›uni, har Føroya Arbei›sgevarafelag og Føroya Handsverksmeistarafelag vístu á, at dygdin í okkara útbúgvingum hevur stóran t‡dning fyri okkara kappingarføri, skrivar Vinnuhúsi›.

Fær ungdómur okkara ikki hollar útbúgvingar, i› standa seg millum tær fremstu í heiminum, hevur føroyskt vinnulív einki stø›i at byggja framtí› sína á. Dentur eigur at vera lagdur á útbúgvingar á einum høgum tøkniligum stø›i, sum er ájavnt ella helst betur enn ta› er í vinnulívinum. Ta› er tí sera t‡dningarmiki›, at ta› almenna ra›festir útbúgvingarnar høgt.

Játtanin endursko›ast

Spurningurin er, um handverksútbúgvingar ver›a ra›festir nóg høgt. Næmingartímar á Tekniska Skúla í Tórshavn eru farnir úr 139.840 tímar í 1994 til 251.150 tímar í ár 2000 (í 1997, 158.590 tímar, í 1998, 182.720 tímar og í 1999 212.800 tímar). Hetta er at frø›ast yvir, tí hetta vísir, at lærlingar ver›a settir í læru og virksemi› er í landinum. Lønargjaldingarnar innan ídna›, handverk og bygging eru eisini farnar úr kr. 477,2 mío. í 1994, tá i› tær vóru uppá ta› lægsta til kr. 766,3 mió. í 1999.

Sambært fíggjarlógaruppskotinum fyri 2001 er nettoútrei›slujáttanin hækka› úr kr. 13.310 mió. í 1997 til 14.240 í 2000. Hetta er ein vøkstur á uml. 7%, me›an næmingatímar í sama tí›arskei›i eru hækka›ir vi› uml. 58%. Ta› er ikki givi›, at hesi tøl skulu samsvara nágreiniliga, tí at støddin á flokkum hevur eina ávísa ávirkan, men hesi tøl benda á, at ov líti› samband er millum næmingatímar og játtan. Tí er ney›ugt at játtanin til Tekniska skúla í Tórshavn ver›ur endursko›a›, skrivar Vinnuhúsi›.

VI‹MERKINGAR

Ein endalig fullveldisætlan

Høgni Hoydal
Landsst‡risma›ur

Talan ver›ur ikki um stig fyri stig politikk. Ein endalig avrigging skal gerast solei›is, at alt er komi› undir føroyskt lóggávuvald innan ásett áramál - tildømis í seinasta lagi 2006.

Ta› er hetta, sum Føroya fólk skal taka stø›u til á fólkaatkvø›uni í apríl næsta ár.

Ta›, sum ikki ber til vi› Danmark, mugu vit gera sjálvi. Vit gera okkara egnu skiftistí› og taka avger›irnar í Føroyum.

Ta› er ni›urstø›an eftir tær mangan sjónleikakendu samrá›ingarnar um ein sáttmála millum Danmark og Føroyar eftir tí íslendska leistinum.

Samgongan og landsst‡ri› hava tí lagt eina ætlan á bor›i› fyri, hvussu fullveldisætlanin ver›ur førd á mál vi› føroyskum avger›um.

Onki stig fyri stig

Onkur er nú farin at tosa aftur um stig fyri stig politikk og yvirtøkur sambært heimast‡rislógini.

Hetta liggur ikki í teirri semju, sum er gjørd.

Talan er um eina púra fastlagda ætlan, har heimast‡rislógin skal avriggast, blokkstu›ulin minkast burtur og eitt sjálvstø›ugt ríki ver›ur sett á stovn vi› føroyskari grundlóg.

Fólkaatkvø›an í apríl

Á fólkaatkvø›uni í apríl skal Føroya fólk spyrjast um tey taka undir vi› hesi ætlan um føroyskt fullveldi - vi› einum føstum áramáli.



Landsst‡ri› hevur ikki melda› út, hvat áramál kemur at standa á atkvø›use›linum. Tí so ver›ur bara aftur fari› at tosa um, hvat danska stjórnin sigur og so framvegis.

Í seinasta lagi 2006?

Men eftirsum ivi tykist ver›a sáddur um ætlanina, er rættast at uppl‡sa: Ta›, sum uppskoti› byggir á, er, at í seinasta lagi — tildømis ár 2006 skulu øll málsøki ver›a komin undir føroyskt lóggávuvald og heimast‡rislógin avrigga›. Ta› kann sjálvsagt eisini gerast innan ta tí›.

Tá bindingarnar eru burtur skal føroysk grundlóg leggjast til fólkaatkvø›u og vit eru eitt fult sjálvstø›ugt land.

Sostatt er hetta ein endalig ætlan, sum Føroya fólk skal taka stø›u til — og ikki nøkur leys og ótrygg loysn.

Lat ongan iva valda um ta›.

Børnini skulu ra›festast fremst

Elin Lindenskov
b‡rá›slimur
Javna›arlfoksins í Havn

Vit í Javna›arflokkinum halda, at ta› at ganga í barnagar›i eigur at vera líka so náturligt, sum at fara í skúla.

Til seinasta val lova›u vit at loysa barnaansingartørvin innan 10 ár. Tá var búskaparkreppan ikki av, og tá mettu vit, at kommunan kundi klára 30 n‡ggj pláss um ári›. Tá stó›u 289 børn á bí›ilistanum, sum ikki høvdu naka› tilbo› um pláss.

Seinastu 4 árin hava vit útbygt barnagar›splássini vi› 280 plássum afturat - 70 n‡ggj pláss um ári›. Vit hava útbygt meira enn ta› dupulta av tí, vit lova›u. So í veruleikanum hava vit loyst tann tørv, i› var tá. Vit hava enntá loyst tørvin uppá 4 ár, sum vit vænta›u at loysa uppá 10 ár. Javna›arflokkurin er tann einasti flokkur, sum hevur tora› at bundi› seg til at tryggja øllum børnum mennandi barnaansingartilbo›.

Hóast risastóru útbyggingina, so standa enn út ímóti 400 børn á bí›ilistanum til barnagar›spláss. Hetta kemst av, at tilflytingin til Havnar hevur veri› sera stór seinastu árini.

Javna›arflokkurin hevur alla tí›ina arbeitt fram ímóti at loysa barnagar›størvin, men ta› hevur veri› trupult at fylgt vi›, tá i› fólkatali› samstundis veksur so skjótt. Tí hava vit lagt eina ætlan, sum vil loysa tørvin eftir trimum árum. Javna›arflokkurin heldur, at um viljin er til sta›ar, so ber væl til at nøkta tørvin 100%.

Hagtøl, sum byggja á ein vøkstur í fólkatalinum uppá 5% um ári›, vísa okkum, at barnatali› ikki fer at vaksa so nógv sum nú, nøkur ár fram yvir, tí duga vit ikki at skilja, hví a›rir flokkar eru so bangnir fyri at loysa barnaansingartørvin. Fyri Javna›arflokkin er ta› ein spurningur um vilja, vilja til at loysa tann mest átrokandi spurningin, sum er í kommununi í dag. Ta› ræ›ur bara um at ra›festa. Javna›arflokkurin hevur valt at ra›festa børnini ovast.

Ofta etur hundur ta›, hann havnar

Jóannes Eidesgaard
forma›ur Javna›arfloksins



Landsst‡ri› rudda›i allar yvirskriftir í gjár, tá teir á tí›indafundi bo›a›u frá, hvussu n‡ggja sjálvst‡ristilgongdin fór at ver›a tilrættaløgd. Lat meg byrja vi› at siga, at ta› gle›iliga í øllum i hesum politiska hurlivasa, sum var í gjár, var, at sjálvst‡rislandsst‡ri› nú hevur slept ætlanini um at skipa Føroyar sum eitt fullveldi her og nú. Landsst‡ri›, sum bert hevur veri› samt um hetta einstaka máli›, og sum hevur brúkt alla sína orku og alla orkuna í embætisverkinum umframt ein hóp av pengum til júst hesa einstøku ætlan, hevur nú kúvent. Og sjálvandi mugu vit sum andstø›a, sum hevur ávara ímóti hesi gongd, frø›ast um, at menn eru vor›nir ta› klókari. Men løgi› kann ta› vera í politikki.

Zakarias Wang kalla›i dagin 26 okt., tá seinastu samrá›ingranar vóru, fyri ein søguligan dag. Ta› er so hansara meting, men mær lysti at vita›, hvussu nógvir tjó›veldismenn fara at siga, at dagurin í gjár var søguligur. Politiskt var hann søguligur, tí ta› var henda dagin, at vit fingu tveir n‡ggjar heimast‡risflokkar, sum nú í 52 ár ikki hava vilja vita› av hesi "ólukku" heimast‡rislóg. Fólkaflokkurin og Tjó›veldisflokkurin hava nú lyft heimast‡rislógina uppaftur til "æru og verdigheit". Teir hava sett sær sum mál at fullfíggja hesa lóggávu, sum teir í hálva øld hava lasta› undir sand og øsku.

Í hesum sambandi fari eg at ynskja Sjálvst‡risflokkinum tillukku vi› hesi loysnini. Sjálvst‡risflokkurin stendur sum tann stóri sigursharrin eftir hesa samgongukreppu, tí ta› er nú stig fyri stig politikkurin frá 1906, sum hevur sigra›. Sokalla›u sjálvst‡risflokkarnir hava havt fyri vana at flent at hesum politikki, tí hann bar ongantí› á mál, men í gjár var ta› júst tann politikkurin, sum teir allir hava tiki› til sín.

Eg kann líti› ætla›, hvussu gla›ur gamli Alf Ross hev›i veri›, um hann hev›i liva›. Ta› var jú hann, sum fyri 52 árum sí›ani smí›a›i heimast‡rislógina, sum nú er vor›in krumtappurin í føroyskum sjálvst‡rispolitikki. Og henda "delegatiónin", t.v.s. møguleikin hjá donskum myndugleikum at leggja seg út í føroysk vi›urskifti, hann ver›ur so partur av okkara politiska gerandisdegi í minsta lagi komandi 20 árini.

Fyri nøkrum fáum døgum sí›ani hoyrdu vit mentamálará›harran siga vi› buldur og brak, at ta› kom ikki upp á tal, at fólkakirkjan skuldi yvirtakast eftir heimast‡rislógini, nei hon skuldi gerast føroyskt vi› fullveldinum. Mær lysti at vita›, hvat sami ma›ur sigur í dag?

Og hvussu ofta hevur ikki landsst‡risma›urin í sjálvst‡rismálum, sum nú má fáa heiti› landsst‡risma›ur í heimast‡rislógini, ikki sagt, at hatta uppskoti› um sjálvst‡rislóg, sum Javna›arflokkuirn hevur, er bert heimast‡rislógin enn einafer›. Ta› er sjálvst‡rislógin sjálvandi ikki, men uppskot landsst‡risins er so sanniliga nú bert sjálv heimast‡rislógin.

Men ta› var fyri okkum í Javna›arflokkinum ein sonn frøi at hoyra, at henda sjálvst‡rissamgonga, sum um hon nú hev›u uppfunni› djúpa tallerkin fyri minst a›ru fer›, bo›a›i frá teimum møguleikum, sum liggja í at tøma gomlu heimast‡rislógina. Men hesin møguleiki hevur veri› til sí›an 1948, og ta› er so avgjørt einki n‡tt í tí. P. M. Dam se›i fyri 52 árum sí›ani, at heimast‡rislógon gekk heilt at loysingini, og nú fáa vit sama bo›askap frá landsst‡rinum. Ja, mangt er løgi› í politikki, ta› er so ta›. Men vit mugu so eisini sta›festa, at ofta etur hundur ta›, hann havnar.

Nøkur av teim málum Mi›flokkurin fer at virka fyri

Jenis av Rana

... at fáa kristnu sjónvarpsstø›ina, Christian Channel, á Rás " tórs " havn.

... at skúlanæmingar frítt skulu kunna samlast til andaktir á skúlum sínu

... at or›i› bí›ilisti, til t.d. eldrarøkt og barnaansing, skjótt skal ver›a eitt ókent or›.

... at 100% ør›vísi skal ver›a prioritera (ra›fest) vi› skattakrónum borgarans.

... at landsst‡ri› skal ver›a noytt at l‡sa eftir og seta skúlalækna.

... at eitt mi›víst b‡rá›sarbei›i ver›ur sett í verk at ste›ga rúsdrekka- og rúsevnisn‡tslu.

... at b‡ra›i› aktivt fer til verka at fáa til vega betri umstø›ur fyri breka›u og veiku okkara.

... at b‡rá›i› sær sum eina av uppgávum sínum at hjálpa til at fáa til vega grundøkir.

p.s. ivast tú um hesi mál eru gjørlig, hugsa so um nærvørpini og umbo›smannin! Einki hendi í áravís uttan tos, og fá trú›u at naka› fór at henda!

Til borgararnar í Tórshavnar Kommunu

Meta C. Palle
Valevni Javna›arfloksins í Havn

Fyri 30 árum sí›ani flutti eg til Føroyar úr København og búsetti meg í Tórshavn.

Tórshavn er broyttur nógv. Tórshavn er ein gó›ur b‡ur at búgva í, sum tekur hgond um sínar borgarar, men á nøkrum økjum kundi ta› veri› betur, so sum barnagar›ar/eldrapolitikk og onnur ting. Eg kundi hugsa› mær at arbeitt vi› eldrapolitikki og íbú›artrupulleikum og at veri› vi› til at gera dagin lættari fyri borgaran í Tórshavnar kommunu og herundir eisini Kollafjør›.

Ta› er eisini ney›ugt at diskutera› fer›sluna í Tórshavn solei›is, at ta› er lættari hjá fótgangandi/súkklandi borgarum. Eg vil arbei›a »med sund fornuft«.